Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Lærlingar og lesandi

Spurningar:

1. Hevur samgongan ætlanir um at veita fíggjarligt ískoyti til lærlingar og lesandi, sum mugu brúka bil at ferðast millum skúla/lærupláss og heimið?
2. Um svarið er ja, nær verður hetta so gjørt?
3. Um svarið er nei, hvør er so grundgevingin fyri hesum?

Viðmerkingar:

Øktu útreiðslurnar til brennievni ávirka eisini fíggjarstøðuna hjá lærlingum og lesandi. Lærlingar/lesandi, sum mugu hava bil fyri at sleppa í skúla, eru eisini rakt, tí hesi ofta hava lítla inntøku, antin lærlingaløn ella studning. Hóast bussamband er, so ber ikki altíð til at brúka bussrutuna, tí ofta sita lærlingar og gera skúlating saman eftir skúlatíð. Tí kann vera kostnaðarmikið hjá lærlingum, sum búgva eitt nú í Norðoyggjum, Eysturoynni ella Vágum, um tey mugu brúka bil fyri at røkja skúlan í t.d. Havn.
Fyri at fáa greiðu á málinum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 26. september 2022

Beinta Løwe Jacobsen